umhvørvisstovan

# Ískoyti til umhvørvisgóðkenning

sambært kapittul 5 í Ll. nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **P/F Marine Harvest Faroes** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Ternubrekka 3, 695 Hellurnar | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| Rognkelsi sum reinsifiskur | |
| Aliloyvi.: | Alifjørður: |
| C-17 | Sandsvág og Skúvoyarfjørður |
| Alistøð: | Aliøkið: |
| AS-31 | A-90 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 14/00590 | 1. juni 2016 |

Umhvørvisstovan, tann 1. juni 2016

Suni Petersen, deildarleiðari / Lena Ziskason, umhvørvisviðgeri

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

## 1. Umsókn

Vísandi til umsókn frá P/F Marine Harvest Faroes, mál nr. 14/00590-37 har søkt er um at innflyta og brúka rognkelsi framleidd í Íslandi, sum reinsifisk á aliøkinum A-90, verður hervið veitt tíðaravmarkað ískoyti til umhvørvisgóðkenningina fyri alivirksemi á C-17, Sandsvág og Skúvoyarfjørður, mál nr. 14/00590.

Ískoytið er galdandi til 1. nov. 2017.

## 2. Góðkenning og heimild

Hetta ískoytið til umhvørvisgóðkenning av alivirkseminum hjá P/F Marine Harvest Faroes, mál. nr. 14/00590-20, er givið við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd við seinni broytingum og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Ískoytið fevnir um aliøki A-90, aliloyvi C-17 við tilhoyrandi ískoyti.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning ella loyvi eftir aðrari lóggávu.

## 3. Lýsing

Royndir at nýta rognkelsi sum reinsifisk fyri lús hava verið gjørdar í Føroyum í eina tíð. Rognkelsi verða sett út saman við laksinum og tikin aftur tá hann verður tikin. Vitanin um at nýta rognkelsi, og hvørja ávirkan tað kann hava á dálkingarviðurskifti o.a. er enn avmarkað.

Umhvørvisstovan heldur, at tað er skilagott at brúka natúrliga niðurberjing av lús heldur enn at nýta kemisk evni, sum kunnu hava skaðiliga ávirkan á umhvørvið og djóralívið á botni. Men við tað, at vitanin um møguligar avleiðingar við smittu, genetiskari ávirkan o.ø. enn er avmarkað, verður bara veitt tíðaravmarkað góðkenning í eitt framleiðsluumfar til at seta rognkelsi út.

Ætlandi verða millum 15-20 % rognkelsi í mun til laks í hvørjum ringi. Um lutfallið av rognkelsum í mun til laks fellur í ringunum, verða nýggj rognkelsi sett út í ringarnar.

Deyður fiskur, bæði laksur og rognkelsi, verða tikin upp og tikin inn á landstøðini, har hann verður malin, súrgaður og goymdur í einum tanga. Síðan verður hann fluttur til Salmon Proteins á Eiði.

## 4. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum:

4.1.1. Áðrenn rognkelsini verða sett út, skal P/F Marine Harvest Faroes skráseta nøgd av innfluttum rognkelsum, støðd, vekt, meskavídd á nót, innblanding í % í hvørjum ringi sær og senda tað til Umhvørvisstovuna, saman við niðurskrivað mannagongd fyri nýtslu av rognkelsum.

4.1.2. Um nøkur broyting verður gjørd í mannagongdum fyri nýtslu av rognkelsum skal Umhvørvisstovan kunnast og um neyðugt góðkenna broytingina.

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

4.1.3. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig árin frá nýtslu av rognkelsum, t.d. um rognkelsir eru sloppin.

4.1.4. Um nýggj vitan kemur fram viðv. nýtslu av rognkelsum, kann Umhvørvisstovan seta herdar treytir, nokta útsetu ella krevja, at ætlaða nøgdin av rognkelsum at seta út, verður minkað.

4.1.5. P/F Marine Harvest Faroes skal hava niðurskrivaðar mannagongdir fyri fyribyrging av óhappum og hvat skal gerast um óhapp hendir, t.d. um fiskur ella rognkelsi sleppur.

4.1.6. Henda óhapp og fiskur sleppur, skal skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk v.m. sendast Umhvørvisstovuni.

4.1.7. Fyri hvønn mánað skal P/F Marine Harvest Faroes skráseta:

- Tal og stødd av útsettum rognkelsum
- Tal av deyðum rognkelsum
- Tal av møguliga slopnum rognkelsum
- Tal og stødd av møguligum rognkelsum sum verða útsett afturat í ringarnar
- Fóðurnýtsla til rognkelsini
- Rakstrartrupulleikar/óhapp sum hava umhvørvisligan týdning.
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi.

4.1.8. Skrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmynduleikanum, og skulu goymast í minsta lagi 5 ár.

4.1.9. Tá framleiðsluumfarið er liðugt, skal Umhvørvisstovan hava eina endaliga frágreiðing, sum tekur saman um gongdini av nýtslu av rognkelsum. Frágreiðing skal sendast Umhvørviststovuni í seinasta lagi ein mánað eftir at útsetanin er liðug.

4.1.10. Frágreiðingin skal m.a. innihalda eitt samla yvirlit yvir nøgd av rognkelsum útsett í hvønn ring, felli, um nýggj rognkelsi eru sett út, nøgd av rognkelsum tikin uppaftur og orsøk til møguligt svinn.

## 5. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýriskvinnuna við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:** Sands kommuna, Mørkin Mikla 3, 210 Sandur
Heilsufrøðiliga starvsstovan, Falkavegur 6, 2. hædd, 100 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, 110 Tórshavn